From: Bára Michelsen <Bara@fmr.fo> **On Behalf Of** Fíggjarmálaráðið
Sent: leygardagur, 11. mai 2024 15:44
To: Løgting <logting@logting.fo>; Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Cc: Ruth Vang <Ruth@fmr.fo>; Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>
Subject: Viðv. løgtingsmáli 79/2023 um heildarætlan fyri Kjarnuna

Útboð

Í sambandi við nevndarviðgerð av løgtingsmáli 79/2023 um heildarætlan fyri Kjarnuna hevur verið spur,t um tað er møguligt at umhugsa at bjóða rammuavtaluna av mennarum til Outsystems út av nýggjum.

Rammuavtalan kann sigast upp við 3 mánaðar freist. Tað ber tí til at bjóða rammuavtaluna út av nýggjum. TAKS hevur ávís fyrivarni til at gera hetta. Víst verður til viðmerkingarnar frá TAKS í nevndarmálinum.

Tað vóru fýra KT veitarar, sum góvu TAKS tilboð at veita menningartímar at gera nýggja brúkaraflatu til Kjarnuna. Marknaðurin hevur møguliga broytt seg síðani útboðið, og tí kann ikki úthýsast, at fleiri føroyskir KT veitarar høvdu bjóðað uppá eina rammuavtalu, um henda varð boðin út av nýggjum.

Landsstýriskvinnan fer tí í samráð við TAKS at gera eina meting av, um tað er skilagott at gera eitt nýtt útboð av rammuavtalu um OUTSYSTEMS.

Hetta merkir tó ikki, at valið at brúka OUTSYSTEMS sum menningaramboð verður slept. Í so máta fylgir TAKS somu mannagongd, sum longu verður brúkt í sambandi við menning av Vanganum og Kervis+ hjá Føroya Gjaldstovu/Talgildu Føroyum. Tá er talan um, at KT starvsfólk verða innveitt til tað almenna og tað er tað almenna, sum stýrir menningini.

Vinaliga,

Ruth Vang,

Landsstýriskvinna í fíggjarmálum